Dagf. 20. mai 2020
HMR J. nr. 20/00464-7

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 80/2019 eftir § 52a í tingskipanini um flyting av Barnadeildini frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvat heldur landsstýrismaðurin um, at børnini missa Barnadeildina og verða innløgd saman við vaksnum?
2. Metir landsstýrismaðurin, at broytingin á pædiatriska økinum er til barnsins besta, og í samsvari við sáttmálan um barnarættindini?
3. Eru starvsfólkini á Barnadeildini tikin við í avgerðina at flyta Barnadeildina?
4. Hvørja ávirkan fer tað at hava á innleggingar hjá børnum, at Barnadeildin verður flutt?
5. Hvat fer at mangla á deildini, har børnini vera flutt til, í mun til tær umstøður, sum eru á Barnadeildini?
6. Hvørja ávirkan fer tað at hava á virksemið nú og komandi mánaðirnar, at seingjatalið er minkað so nógv?
7. Kann tað roknast við, at Barnadeildin frameftir kann flytast og minkast t.d í feriutíð?
8. Sjúkrarøktarfrøðingarnar á Barnadeildini hava frásagt sær fakliga ábyrgd av pædiatriini. Hvat merkir hetta í praksis og hvør hevur so ábyrgd?

Svar:

1. **Hvat heldur landsstýrismaðurin um, at børnini missa Barnadeildina og verða innløgd saman við vaksnum?**

Yvirskipað skipar leiðslan í sjúkrahúsverkinum virksemið, herundir hvussu seingjatilfeingið verður nýtt mest skynsamt. Í hesari truplu støðu við koronafarsóttini hevur tørvur verið á, at kunna umskipa seg skjótt við tí seingjatilfeingið, sum er tøkt, samstundis sum annað virksemið í sjúkrahúsinum kemur í gongd aftur. Hetta verður sjálvsagt gjørt við virðing fyri tí virksemi, sum verður ávirkað av hesum. Arbeitt verður samstundis við at finna meira varandi loysnir. Landsstýrismaðurin hevur álit á, at leiðslan er før fyri at fremja tílíkar umskipanir í samráð og samstarvi við avvarðandi leiðslu og starvsfólk.

Tað er umráðandi at gera greitt, at flytingin ikki hevur við sær, at børn verða innløgd saman við vaksnum sjúklingum. Hurð er sett ímillum seingjadeildina á barnadeildini og medisinsku seingjardeildina, sum skilur hæddina B7 í tvey. Soleiðis er talan um tvær atskildar deildir, har hvørki starvsfólk ella sjúklingar koma saman.

2. **Metir landsstýrismaðurin, at broytingin á pædiatriska økinum er til barnsins besta, og í samsvari við sáttmálan um barnarættindini?**

Ítøkiliga snýr málið seg um avgerðina hjá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum um at flyta seingjadeildina á barnadeildini upp á B7 fyribils í sambandi við, at serstaka koronadeildin verður tillagað og flutt. Ambulanta virksemið á barnadeildini verður framvegis á B5. Avtalað er, at barnadeildin verður savnað aftur á B5 í seinasta lagi 1. september 2020.

Í mars varð serstaka koronadeildin skipað á Landssjúkrahúsinum í sambandi við koronatilbúgvingina, sum Sjúkrahúsverkið tá setti í verk. Hetta hevði við sær, at talið av medisinskum seingjarplássum lækkaði við 15 plássum. Tørvur hevur alla tíð verið á hesum seingjarplássum, tí talið av akuttum medisinskum sjúklingum hevur verið sum vant. Høvuðsorsøkin til nevndu innanhýsis flytingar á Landssjúkrahúsinum, hevur sostatt verið at fáa til vega fleiri medisinsk seingjarpláss.

Tað hevur havt stóran týdning í fyrireikingini, at tænastan so vítt gjørligt varðveitti sama støði, sum undan flytingini. Eisini hevur sjúkrahúsleiðslan samskift við deildarleiðsluna á barnadeildini, sum eru deildarleiðarin, varaleiðarin og allar barnalæknararnar. Hesi hava váttað, at tað fakliga er í lagi at flyta barnadeildina fyribils.

3. **Eru starvsfólkini á Barnadeildini tikin við í avgerðina at flyta Barnadeildina?**

Sum nevnt omanfyri, so hevur sjúkrahúsleiðslan samskift við deildarleiðsluna á barnadeildini, sum eru deildarleiðarin, varaleiðarin og allar barnalæknararnar, og fríggjadagin 1. mai varð kunngjørt innanhýsis, at flytingin fór at fáa virkna frá mánadegnum 4. mai. Men eftir mótmæli frá starvsfólkunum á barnadeildini varð ætlaða broytingin í fyrstu syftu útsett, og stundir vórðu settar av til at kunna starvsfólkini betri og svara teimum ivaspurningum, ið ætlaðu broytingarnar høvdu við sær.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum viðgongur, at tey vóru ov brá, tá ein loysn varð meldað út. Fundir vóru tí hildnir við øll starvsfólkini við tí endamáli, at leggja flytingina til rættis saman við starvsfólkunum, soleiðis at trygdin og fakligheitin var í lagi. Samstundis verða broytingarnar fylgdar tætt og í tøttum samskifti við leiðslu og starvsfólk, og tikið verður hond um tær avbjóðingar, sum møguliga stinga seg upp.

4. **Hvørja ávirkan fer tað at hava á innleggingar hjá børnum, at Barnadeildin verður flutt?**

Talan er ikki um somu høli, sum starvsfólkini og børnini eru von við. Hóast hetta, er tað gjørt nógv burturúr, at virksemið kann halda fram so óbroytt sum gjørligt, og øll neyðug útgerð er flutt við.

Á barnadeildini á B5 er innrættingin serliga barnavinarlig við millum annað spælistovu. Nógv av tí, sum hugnar um, og gjørdi B5 barnavinarliga, er tikið upp á B7, nú seingjadeildin er flutt – eitt nú myndir og prýði. Í gongini eru barnaborð og stólar, meðan bamsur, dinosaurar og aðrar leikur standa í vindeygunum og aðrastaðni. Børnini hava eisini eitt breitt úrval av leikum, borðspølum og teknibókum við litblýantum at stytta sær stundir við. Spælistovan, sum er á B5 hevur verið stongd, síðani koronasmittan fór at gera um seg, so hon hevði ikki verið tøk kortini.

Tað er umráðandi at undirstrika, at tey dugnaligu starvsfólk á barnadeildini framvegis eru tey somu, og tey gera sjálvandi alt fyri, at børnini og foreldur teirra kenna seg trygg og í góðum hondum, meðan tey eru innløgd.

5. **Hvat fer at mangla á deildini, har børnini vera flutt til, í mun til tær umstøður, sum eru á Barnadeildini?**

Sambært sjúkrahúsleiðsluni er tað okkurt, sum ikki ber til at flyta. Á B5 eru eitt nú serligar umstøður at brúsa børnum, sum bera fjølbrek. Tílíkar umstøður eru ikki á B7, men í fall eitt barn við fjølbreki verður innlagt, ber til at skipa soleiðis fyri, at barnið verður vaskað í seingini.

6. **Hvørja ávirkan fer tað at hava á virksemið nú og komandi mánaðirnar, at seingjar-talið er minka so nógv?**

Væntandi fær tað ikki stórvegis ávirkan. Tá seingjadeildin var á B5 vóru 7 seingjarpláss, nú eru 4 við møguleika fyri at fáa til vega tvey aftrat – sostatt 6 seingjarpláss. Síðani koronasmittan fór at gera um seg, hava sera fá børn verið innløgd á barnadeildini og í løtuni er bert eitt barn innlagt. Starvsfólkini eru dugnalig og duga væl at loysa avbjóðingarnar, tá tær koma. Tað hava eisini verið støður, tá 7 seingjarpláss ikki vóru nóg mikið, og tá hava starvsfólkini eisini loyst tað.

7. **Kann tað roknast við, at Barnadeildin frameftir kann flytast og minkast t.d. í feriutíð?**

Ongar ætlanir eru um tað. Støðan við koronasmittu er heilt serstøk, og kann ikki samanberast við t.d. eina summarfrítíð.

8. **Sjúkrarøktarfrøðingarnar á Barnadeildini hava frásagt sær fakliga ábyrgd av pædiatriini. Hvat merkir hetta í praksis og hvør hevur so ábyrgd?**

Sjúkrahúsleiðslan hevur boðað Heilsumálaráðnum frá, at hon ikki er kunnug við, at sjúkrarøktarfrøðingarnir hava frásagt sær fakligu ábyrgdina av deildini, men leiðslan er takksom fyri teirra samstarvsvilja í hesum trupla máli.

Heilsumálaráðið, 20. mai 2020

Kaj Leo Johannesen

landsstýrismaður